Landssjúkrahúsið

# Kravfesting

viðvíkjandi veiting av

frukt til starvsfólk og sjúklingar

og

frukt og grønmeti til køkin

til Landssjúkrahúsið

**Fylgiskjal 1**

**Innihaldsyvirlit**

1. Lýsing ... 3
2. Vavið av útboðnu uppágavuni ... 3
3. Góðskukrøv ... 3
3.1 Frukt til starvsfólk og sjúklingar: ... 3
3.2 Frukt og grønmeti til køkin: ... 4
4. Vørumóttøka ... 5
5. Bílegging og veiting og logistisk viðurskifti ... 5
6. Innpakking ... 6
7. Flutningur ... 6
8. Kundatænasta ... 6
9. Tilboðsprísir og vekting ... 6

# 1. Lýsing

Talan er um veiting av frukt til starvsfólk og sjúklingar, og frukt og grønmeti til køkin á Landssjúkrahúsinum.

Landssjúkrahúsið ynskir eina loysn við eftir árstíðunum spennandi og fjølbroyttum vøruúrvalið. Tilboðsgevarin skal kunna bjóða eitt vøruúrval við ymiskum støddum á fruktkassum og við einum fjølbroyttum innihaldi og góðsku.

Tilboðsgevarin skal veita vissu fyri, at tað sum verður útvega eftir hesi avtalu lýkur tey krøv, umhvørvisreglar v.m., sum eru galdandi í avtalutíðarskeiðinum.

# 2. Vavið av útboðnu uppágavuni

Samlaða innkeypið er gjørt út frá innkeypinum í tíðarskeiðinum 1. september 2018 til 31. august 2019. Landssjúkrahúsið kann ikki staðfesta neyvt keyp í komandi avtalutíðarskeiði, og mongdin er tískil ikki bindandi fyri Landssjúkrahúsið.

Veiting til Landssjúkrahúsið fevnir yvir nógv ymisk støð/deildir. Sí fylgiskjal 4 og 5. Talan er um beinleiðis vøruútbering til deildir/støð og støð har LAndssjúkrahúsið sjálvi syrgja fyri útbering til deildir/støð. Mongdin á støðum/deildum kann broytast í avtalutíðarskeiðinum.

# 3. Góðskukrøv

Vørurnar skulu vera egnaðar til endamálið og fylgja galdandi standardum og normum. Vørurnar skulu allan vegin (framleiðsla, tilevning og veiting) vera viðgjørt eftir til einhvørja tíð galdandi lóggávu innan øki.

Allar vørur skulu vera frískar, javnar og óspiltar og hartil hava ein góðan og frískan smakk. Tað má ikki veitast frukt og grønmeti sum vísur tekin uppá at vera gamalt ella spilt. Harafturat má frukt og grønmeti ikki hava merkir ella onnur tekin uppá yvirbúning ella trýst og reinføri skal vera í ordan.

Víst verður eisini til Rakstarreglurnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Tilboðsgevarin skal kunna bjóða fruktir og grønmeti eftir árstíðunum.

Vørurnar skulu kunna tola flutning og handfaring, og verða veittar til støð/deildir í nøktandi standi.

Vørurnar skulu vera nøktandi búnaðar til beinleiðis nýtslu tá vørurnar vera veittar, uttanso at annað verður tilskilað í tilboðslistanum.

## 3.1 Frukt til starvsfólk og sjúklingar:

LS ynskir 3 støddir av fruktkassum til starvsfólk og sjúklingar:

- **Stórur kassi** (Large) svarandi til á leið 70 fruktir
- **Miðal kassi** (Medium) svarandi til á leið 50 fruktir
- **Lítil kassi** (Small) svarandi til á leið 25 fruktir

Fruktir til sjúklingar skulu vera fruktir ið eru klárar at eta uttan at skula viðgerast ella skerast í stykkir áðrenn.

Tilboðið skal hava ein **fastan prís** fyri kassastøddina leverað á ávístum stað á Landssjúkrahúsinum, sí fylgiskjal 4.

Tilboðið skal innihalda í minsta lagi 5 dømi um stóran kassa (Large), 5 dømi um miðal kassa (Medium) og 5 dømi um lítlan kassa (Small). Dømini skulu eisini lýsa, hvussu tilboðsgevari ætlar at skifta veitingina millum ymsu kassarnar.

Eitt týdningarmikið krav til hesa veiting er, at fruktin í kassunum avspeglar árstíðina. Møguleiki er fyri, at variera kassarnar við eitt nú snack-gularótum/agurk o.l., annað snack so sum turrar fruktir og nøtir. Tilboðsgevari kann sjálvur variera innihaldið í kassunum eftir árstíðini, og tí skulu dømini nágreiniliga lýsa innihaldið í framtíðar kassunum. Talan er ikki um úttømandi dømir, men nóg mikið til, at LS fær eina greiða fatan av, hvussu fruktveitingarnar til starvsfólkini og sjúklingar verða.

Tað vil í stuttum siga, at tilboðsgevari skal lýsa, hvussu hann vil uppfylla fruktmiksið i kassunum, og hvussu hann ætlar at skifta fruktmiksið í mun til árstíðirnar. Henda lýsing vektar nógv í samanberingini millum tilboðsgevarar. LS leggur stóran dent á, at súreplir *ikki skulu* fylla meira enn áleið 30% av innihaldinum í hvørjari kassastødd og bananir *skulu* fylla áleið 25% av hvørjum kassa/dømi. Bananir og súreplir skulu altíð vera í hvørjum kassa.

Tilboðsgevarin skal garantera fyri, at góðskan er jøvn/eins og at tilboðsgevarin ger leypandi góðskueftirlit av teimum vørunum í avtalutíðarskeiðinum. Tilboðsgevarin er pliktaður at kunna skjalprógva, at góðskueftirlit verða framd, tá bíleggjari biður um slík prógv.

Tillagingar verða gjørdar í veitingunum til starvsfólk og sjúklingar í lágorku og um høgtíðirnar. Ein yvirskipaður kalendari verður gjørdur við avtalubyrjan, so at so fáar rættingar sum gjørligt verða seinni.

Tá góðskan ikki er í lagi, boðar LS frá og veitari skal býta um vánaligu fruktina við nýggja frukt/grønmeti ella lata kreditnotu og heinta vánaligu vøruna. Umbýtingin skal vera uttan kostnað fyri LS.

**Sløg av fruktkassum, sum LS ynskir:**

**Lítil kassi (Small)**: Skal rúma ymiskar hondfruktir, so sum bananir, súreplir, perir, og eina frukt frá árstíðini ella ikki-hondfrukt. Kassin skal minst rúma 3 ymisk sløg av fruktum.

**Miðal kassi (Medium)**: Skal rúma ymiskar hondfruktir, so sum bananir, súreplir og perir. Harumframt skal kassin altíð rúma víndrúvum. Ein miðal kassi skal vera ymiskur frá viku til viku og rúma minst 4 ymisk sløg av fruktum, harav 1 slag kann vera ikki-hondfrukt og/ella okkurt slag av snack.

**Stórur kassi (Large)**: Skal rúma ymiskar hondfruktir, so sum bananir, súreplir og perir. Harumframt skal kassin altíð rúma víndrúvum. Ein stórur kassi skal vera ymiskur frá viku til viku og rúma minst 4 ymisk sløg av fruktum, harav 1 slag kann vera ikki-hondfrukt og/ella okkurt slag av snack.

### 3.2 Frukt og grønmeti til køkin:

Vøran hjá Køkinum skal pakkast soleiðis, at tað ikki kemur bland í vørubólkarnar. Vørubólkarnir eru:

- Frukt og grønmeti

Tað er týdniningarmikið at upplýsa góðskusortering og vektklassa á vørunum, so samanberast kann á jøvnum grundarlagi.

Hitin á kølivørum skal maks verða 5°C ± 2°C.

# 4. Vørumóttøka

Vørumóttøka hevur funnið stað, tá fruktkassar og frukt og grønmeti er sett/lagt á avtalað ávíst støð/deildir. Veitarin skal ikki vænta hjálp til útbering og einki ískoytisgjald skal vera álagt sjálva veitingina.

Fylgiseðil **skal** fylgja vøruni, tvs. fysiskt eintak skal fylgja við vørumóttøku. Fylgiseðilin er grundarlagið fyri vørumóttøkuni, og er fylgiseðilin ikki við, kann Landssjúkrahúsið ikki móttaka vøruna. Tilboðsgevarin skal við tilboðsgevan viðleggja dømi um fysiskan fylgiseðil. Tilboðsgevarin váttar við døminum, at tilboðgevarin fær viðlagt fylgiseðil við vørumóttøku frá avtalubyrjan. Fylgiseðilin fyri fruktkassar til starvsfólk og sjúklingar skal latast beinleiðis til køkin.

Fylgiseðilin skal innihalda upplýsingar um vøru, vørunøgd og ordraupplýsingar. Hetta kann vera ordranummar ella navn á bíleggjara.

Starvsfólk í Køkinum taka ímóti vøruni sambært innaneftirlitskrøvum og fylgiseðlinum.

Tá tilboðsgevarin kemur við vøru til Køkin, skal bilførari siga frá, áðrenn farið verður undir at koyra vøru inn til Landssjúkrahúsið. Við inngongdina til Køkin stendur eitt skelti, ið vísir á, hvar ringiklokka er. Hetta fyri at starvsfólk hjá Køkinum kann eftirkanna pakking og góðsku umframt fylgiseðil beinanvegin.

Eru viðurskifitini við fylgiseðli, pakking og góðsku ikki í lagi, verður vøran avvíst.

Galdandi fyri allar vørur er, at haldføri við móttøku skal í minsta lagi vera 50 % eftir í mun til framleiðsludagin.

Orsakað av vørulyftuni í Køkinum, eru serlig krøv til vekt og hædd av vøruveitingini. Mest loyvda vekt er 600 kg brutto, og mest loyvda hædd er 1,20m. Størsti platturin er 80x120mm svarandi til EUR platt.

# 5. Bílegging og veiting og logistisk viðurskifti

Talan er um fastar fruktkassaveitingar samsvarandi árskalendara við møguleika fyri tillaginum og um vikuligar veitingar til køkin við møguleika fyri leypandi ískoytisveitingum. Um evstamark er fyri bílegging ella broyting, skulu tær tey upplýsast í tilboðnum.

Tilboðsgevarin skal kunna tryggja veiting alt árið. Um veitingardagurin er ein halgidagur, so skula vørurnar veitast tann komandi vanliga arbeiðsdagin. Hvør kassi skal vera merktur við navnaseðli við frámerki til deild og/ella stað.

Vøran skal veitast DAP (Delivered at Place) á teimum støðum, sum eru á fylgiskjali 4 og 5.

Um tað eru onnur frá Landssjúkrahúsinum, sum gera eina bílegging av frukt og grønmeti, so skulu somu prísir vera galdandi.

Vøran skal vera væl pakkað í reinum pakkitilfari, sum er vart móti vindi og regni. Harumframt skulu frukt/grønmeti pakkast hvør sær, soleiðis at tær ikki koma í samband við aðrar matvørur. At enda skal pakkast skilagott, so at tung vøra ikki kroystir viðbrekna vøru/frukt.

Tilboðsgevarin skal hava eina tøka elektroniska bíleggingarskipan til veitingar til Køkin, sum skal vera klár til brúk við avtalubyrjan.

# 6. Innpakking

Allur innpakkningur skal vera lætt at lata upp og at handfara.

Allar vørur skulu vera avhendaðar í innpakkningi, sum verjir vørurnar mótvegis dálking og stroyti.

Ynskiligt er at tilboðsgevarin brúkar endurnýtsluinnpakkning, tá tað gevur meining.

Innpakkningurin skal vera 100 % PVC fríður og uttan onnur heilsu- og umhvørvisskaðilig evni/tilfar.

Tilboðsgevarin skal arbeiða fyri, at brúka minst møguligt av innpakkingartilfarið við flutningi og við pakking.

Fruktin til starvsfólk og sjúklingar skal veitast í nossligum/penum og reinum kassum, sum er vælegna til endamálið. Kassarnir skulu avheintast at tilboðsgevarinum á somu støðum, sum veitingin fór fram.

# 7. Flutningur

Landssjúkrahúsið væntar at tilboðsgevarin arbeiðir fyri, at avmarka dálking í samband við veitingina.

Lastbilar og/ella vørubilar ið verða brúktir til vøruútberingina skula ikki lata bilin standa í tómgongd ella hava motorin gangandi ímeðan vøruútberingin fer fram.

# 8. Kundatænasta

Innan fyri vanliga upp- og afturlatingartíð skal tilboðsgevarin kunna móttaka áheitanir frá Landssjúkrahúsinum via teldupost og telefon. Tað skal vera møguligt at gera elektroniskar bíleggingar, og avlýsingar via teldupost.

Starvsfólk hjá tilboðsgevarinum skal hava nóg mikið av kunnleika um vørurnar, sum tryggjar skjóta og skikkaða avgreiðslu og ráðgeving.

# 9. Tilboðsprísir og vekting

Tilboðsprísurin upp á fruktkassar skal vera kassaprísur. Kassaprísurin er fastur í tíðarskeiðnum, ið avtalan fevnir um. Um talan verður um at brúka optiónina (leingjan av avtaluni), kann avtala gerast um eina prísjavning umleið samsvarandi sveiggj í prístalinum ella samsvarandi opnari/skjalfestari vøruprísútrokning (kalkulatión).

Gev gætur, at tá samanborið verður millum tilboð er týdningarmikið, at vektklassin og góðskusorteringin á vørunum er upplýst, soleiðis at samanborið verður á sama grundarlagi. Kassadømini skulu sostatt upplýsa vektklassan á fruktunum í hvørjum dømi. Gev gætur, at talið á fruktum er vegleiðandi, og at dømini skulu lýsa møgulig sveiggj í frukttalinum.

Tilboðsprísurin upp á frukt og grønmeti til køkin verður givin á fylgiskjali 2. Legg til merkis, at ein møguligur avsláttur skal upplýsast. Tilboðsgevari skal greitt tilskilað, hvussu leingi prísurin er galdandi, ella hvussu prístillagingar verða gjørdar í avtalutíðarskeiðnum.

Ein opin ella partvíst opin "kalkulatión" verður vektað í príssamanberingini. Aftur er týdningarmikið greitt at tilskila góðskusortering fyri allar vørurnar og vektklassa, um talan er um stykkjaprís.